# Sveimandi, droymandi kristin rokkur

Tá Direct Level spældi á Margarin Fabrikkini í Havn, vóru ikki nógvir áskoðarar. Men hetta gjørdi bara konsertina meira intima. Bólkurin tyktist heldur ikki merktur av umstøðunum og spældu eina góða rokkkonsert.

Bassleikarin tosaði í millum løgini, og hann var ótrúliga sjarmerandi á ein sunnudagsskúlalærarakend an máta. Hann var øðiliga pedagogiskur og forkláraði væl, um tekst og boðskap. Tað virkaði løgið fyri eina rokkkonsert, men í intimu karmunum riggaði tað væl.

Bólkurin spælir sveimandi og atmosferiskan rokktónleik. Gittararnir eru dominerandi í ljóðmyndini, og skapa eina droymandi kenslu. Eina løtu eru dreymarnir stillir og so spakuliga gerast teir villir. Bassur og trummir eru trygga grundin, sum gittararnir hava støðið á.

Bólkurin er vælsignaður við einum framúr sangara, og røddin hóskar sera væl til stílin. Melodiðirnir hjá bólkinum eru vakrir, og røddin ber løgini. Í løgunum Angels Talking og Oceans of Worries var bólkurin ordiliga góður, hesi løgini tyktust meiri liðug enn hini, og høvdu eitt sterkt útrykk. Í Oceans of Worries runnu gittararnir sama í eitt larmutt gittarhav. Tað varð rátt og vilt, og vakurt.

Nýggjasta lagið bólkinum var gjørt í vikuni, og hetta hoyrdist. All over again, var eitt rættuliga glatt og upbeat lag. Men lagið hvørki svingaði eitt riggaði væl. Serliga byrjanin tyktist óruddilig. Sum frá leið gjørdist lagið eitt sindur betur, men tað trongdi ivaleyst til meira venjing, og eina kerliga hond.

Bólkurin gjørdist nummar tvey í Gospel Prixnum, og hevur tí vunnið eina viku í Studio Pegasus. Hendan vikan skal brúkast skjótt, tí bólkurin hevur ætlanir um at gera eina fløgu, kanska í fyrsta umfari eina maxi fløgu.

**-NuD**

# 200 á G!

Tá 200 í seinastu viku blástu SMS um koll í sambandi við søluna av G! atgongumerkjum, lá tað tjúkt í luftini, at hetta var eitt av nøvnunum, sum skuldi við á festivalin. Í dag vátta fyrireikararnir, at 200 verða við.

Sum vit skrivaðu tá, vildu fyrireikarnir ikki vátta nakað í vikuskiftinum. Men okkara git vísir seg nú at vera rætt.

Fyrireikarnir siga at framførslan á G! Festival verður nakað heilt serligt.

Tann næstan legendariski pappmasjefokkjúfingurin verður faldaður við eini 10 í kraft og stødd og vekt og úttrykki, og goysandi eldur verður lagdur afturat. Hetta ljóðar av nógvum, men er ivaleyst nógv meira.

Vit kunnu longu byrja at gleða okkum. Sambært G! spæla 200 bara tvær konsertir í summar á G! og á Sandi. So hervið er eitt navn til festivalin á Sandi eisini kunngjørt.

**-NuD**



# Havnin átti ársins talgilding

Tórshavnar kommuna varð í vikuskiftinum heiðrað fyri at eiga ársins talgilding. KT-dagur var í Norðurlandahúsinum, sum KT-felagið skipaði fyri, og har skuldi ársins talgilding kjósast. Tórshavnar kommuna nýtir skipanina "Invoices workflow," og henda varð kosin ársins talgilding.

Skipanin váttar og avvísir rokningar í Navision. Tað var Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sum fekk handað eitt steyp við kurlu sum tekin um heiðurin.

**-hkm**



*Heðin Mortensen við kurlusteypinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## "Hví Sjúkrarøktarfrøðingar?"

Hósdagin 12. mai er altjóða dagur Sjúkrarøktarfrøðinga. Í hesum sambandi skipar Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fyri almennum tiltakið í Norðurlandahúsinum. Við hópin av áhugaverdum fyrilestrum og framløgum.

Stevnan verður sett av Jógvan á Lakjuni Landsstýrismanni. Hann greiðir frá ætlanum innan útbúgvingarøkið.

Margret I. Hallgrimsson, depilsleiðari á Universitetssjúkrahúsin um í Reykjavík, hugleiðir um evnið "Hví Sjúrarøktarfrøðingar?". Hetta er eisini heitið á tiltakinum.

Brynhild Danielsen, Sjúkrarøktarfrøðingar og Master of Sciense in Health Promotion, greiðir frá um matviðurskifti í føroysku skúlunum.

Súsanna Mortensen, rektari á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya greiðir frá um sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina.

Ingrid Holm, sjúkrarøktarfrøðingur, greiðir frá arbeiði sínum, ið samband við flóðalduna í Asia.

Ì lættara endanum verður sangur v/ The Nightingales.

Tiltakið er fyri øll og er frá kl.14.00-17.00.

**-NuD**

## SKATING Í FØROYUM

Fyri fyrstu ferð í Føroyum verður skipað fyri innandura skaterkapping. Tiltakið verður í høllini á Hálsi tann 20. og 21. mai.

Kappast skal í street og í rampu. Eitt innleiðandi umfar verður fyrsta dagin, og á seinna degnum verður finalan. Skatarar úr øllum Føroyum koma til kappingina.

Tað er kristiliga ungdómsarbeiðið AlienYouth, sum skipar fyri tiltakinum. Kring tiltakið verður nógv annað á skránni, millum annað DJ, multimedia, prædikur, hárkapping og konsertir. Meira kunning fæst á www.alienyouth.fo

**-hkm**